# Ferðamaðurin og hvonnin

*Jón Festirstein Andreasen, praktikantur*

Í summar var norðmaðurin Gunnar Stordalen á vitjan í Føroyum, har hann var í Tórshavn og upplivdi millum annað Ólavsøkuna.

Á sínari vitjan legði hann til merkis, at hvonn var at finna í nógvum urtagørðum og ymsa aðrastaðni kring landi. Samstundis fór hann at undrast á, hvat ið føroyingar hava brúkt hvonn til, og um hvat teir brúka hana til nú á døgum.

Sjálvur býr hann við Hardangerviddan, har ið nógv hvonn er at finna, men í dag vita flestir norðmenn lítið og onki um hvonn.

Sambart Gomul føroysk heimaráð hjá R.K Rasmussen bleiv hvonn brúkt til matna og heilivág. Mann flusti hvonnina, dróg træðrarnar út og át hana. Tey ið vóru væl fyri sluppu at stoyta sukur omaná. Serliga vóru tað børnini ið vóru hervilig at stjala hvonn

Men hvonnin var best kend fyri síni lekjandi evni. Eitt nú skuldi hvonn hjálpt ímóti svøvnloysi, og eisini var hon góð fyri tey, ið høvdu trupulleikar við at kasta sær av við vatninum. Tó skuldi man ikki eta ov nógv av hvanni, tí man kundi vera í vanda fyri at fáa hvannasár ella hvannakrepping. Tá var best at taka træðrarnar, ið vóru drignar úr hvanninum, og rusla tær um varrarnar.

Villar hvannir vaksa serliga í bjørgunum, men eisini hevði man hvanngarðar. Vanligt var, at tey ið ongan hvanngarð áttu, bóðu um hvonn frá teimum ið høvdu.

Í dag verða hvannir millum annað nýtt til at bryggja gin við.

Hvanngarðar eru eisini ein sjáldsom sjón her á landið, men t.d í Gásadali og á Mykinesi eru hvanngarðar enn at finna.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og ælingur, men sunnudagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 17 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 25 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur yvir Føroyum fer eysturefttir og eitt lágtrýst, 997 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




Lágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga eysturefttir og sunnan fyri lágtrýstið verður nógvur vindur av vestri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/09 kl. 06[00]– 04/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/09 kl. 06[00]– 04/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 15,1 mm

…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo



TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG
12. MAÐUR
Tlf. 213212



## VESTFALLSKYRRINDI

1. sept.: Mánin longst frá jørðini
2. sept.: Fullmáni
10. sept.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. sep | 09.10 | 21.28 | 08.10 | 20.28 | 08.25 | 20.43 | 11.10 | 23.28 | - | 12.10 | 07.25 | 19.43 | 06.25 | 18.43 | 09.25 | 21.43 | 10.25 | 22.43 | 08.55 | 21.13 | 10.10 | 22.28 |
| 6. sep | 09.46 | 22.05 | 08.46 | 21.05 | 09.01 | 21.20 | 11.46 | - | 00.28 | 12.46 | 08.01 | 20.20 | 07.01 | 19.20 | 10.01 | 22.20 | 11.01 | 23.20 | 09.31 | 21.50 | 10.46 | 23.05 |
| 7. sep | 10.24 | 22.44 | 09.24 | 21.44 | 09.39 | 21.59 | 00.05 | 12.24 | 01.05 | 13.24 | 08.39 | 20.59 | 07.39 | 19.59 | 10.39 | 22.59 | 11.39 | 23.59 | 10.09 | 22.29 | 11.24 | 23.44 |
| 8. sep | 11.05 | 23.24 | 10.05 | 22.24 | 10.20 | 22.39 | 00.44 | 13.05 | 01.44 | 14.05 | 09.20 | 21.39 | 08.20 | 20.39 | 11.20 | 23.39 | - | 12.20 | 10.50 | 23.09 | — | 12.05 |